# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Leingi er tað, ið væl skal vera

Leingi er tað, ið væl skal vera. Mánadagin var nýggi skúlabygningurin sunnan fyri Hovsá í Suðuroy alment handaður landsstýrinum, og við hesum er ein drúgv og trupul tilgongd at enda komin. Í sjeytiárunum økti landsstýrið um útbúgvingartilboðini til tey sekstan til nítjan ára gomlu. Eitt úrslitið av hesum skilagóða politikki var, at HF skeið vórðu sett á stovn í Klaksvík, í Eysturoy og í Suðuroy. Men HF var upprunaliga ætlað meira tilkomnum, ið ynsktu at útvega sær eina lestrarfyrirekandi miðnámsútbúgving, so eftir nøkrum árum var HF tilboðið í Suðuroy broytt til vanligt miðnámstilboð - til eina vanliga studentaskúlaútbúgving.

Frá fyrsta degi høvdu miðnámsútbúgvingarnar í Eysturoy og í Suðuroy truplar og vánaligar hølisumstøður. Meðan tað rættiliga skjótt eydnaðist at fáa politiska semju um bygging av nýggjum skúladepli á Kambsdali í Eysuroy, so gekk ikki um fliðuna við líknandi verkætlan í Suðuroy. Skúlin var fyrst í tveimum - ávikavist á Tvøroyri og í Vági, fyri síðan at verða fluttur til Vágs, har húsast varð undir truplum og ótíðarhóskandi umstøðum. Tá so langt um leingi politisk semja fekst um at byggja nýggjan skúla í Vági, varð spakin ikki meira enn settur í, fyrr enn ABC samgongan gjørdi av at flyta skúlan til Hovs og samstundis at rúmka verkætlanina til eisini at fevna um høli til Almanna og heilsuskúlan, sum jú nøkur ár frammanundan varð settur á stovn á Tvøroyri.

Hvørt hesar avgerðir vóru sakliga ella politiskt grundaðar og hvørt alt hetta hevur gagnað føroyskum skúlaskapi, skulu vit ikki taka dagar ímillum her. Okkurt kundi tó bent á, at politiskar grundir hava vegað eins tungt og útbúgvingarfakligar grundir. Tað gevur onga meining at gita um hesi viðurskifti nú. Báðar útbúgvingar hava fingið ikki bert tak yvir høvdið men framúr góðar fysiskar karmar um virksemið. Við tunnlinum millum Hovs og Øravík er Suðuroyggin øll mestsum ein býur og tí eru ongar landafrøðiligar frástøður, sum forða fyri, at nýggi skúladeplini í Suðuroy fer at verða útbúgvingum og lesandi til almikið gagn. Sjálvur bygningurin er, sum tikið varð til við handanina, eitt byggilistarligt meistaraverk. Hann er eitt prýði fyri almenna bygging í Føroyum, sum annars higartil ikki til yvirmát hevur lagt seg eftir bygningestetiskum virðum.

Við nýggja deplinum í Suðuroy hava útbúgvingarnar fingið best hugsandi karmar fyri sínum virksemi og fyri menning av hesum útbúgvingum. Hetta skuldi alt annað líka eisini merkt menning fyri alla oynna. Ein eigur ikki at undirmeta ímyndarliga virði og týdning av staðseting og umhvørvi. Við nýggja bygninginum eru fingnir til vega karmar um skeiðtilboð, mentanarligt virksemi, fundarvirksemi og annað virksemi, sum ímyndar, at oyggin er ein eind, at suðuroyingar eiga at finna saman í eitt nógv tættari kommunalpolitiskt samstarv, um oynni skal vera lív lagað.

**Sosialurin**

## Skal "Kringvarp Føroya" ikki halda kringvarpslógina?

JOHN ÍSHEIM

Føroyskt fólkaræði

**»Tað er ongin loyna í vikuskiftinum, at teltini plussiliga eri bevegaði í útlandinum«**

Undiryvirskriftin er ikki beinleiðis endurtøka men ein samanseting av málbrongli, ið dag og dagliga er at hoyra í almenna kringvarpinum, sum tykist at kunna gera sum tað vil. Men Guð náði tann borgara, sum ikki góðtekur lógarbrot kringvarpsins og noktar at gjalda kringvarpsgjald; hann verður rendur í fútarættin, sum bert viðger innkrevjingarrætt kringvarpsins smb. §7 í kringvarpslógini!

Hin 16. januar 2009 sendi eg fútarættinum soljóðandi skriv:

»Tað átti at verið so, at almennir stovnar í Føroyum virdu mál og mentan landsins og vendu sær til føroyskar borgarar á føroyskum. At nýta fremmant mál er ikki bara ein vanvirðing av føroyskum tjóðskapi og samleika, men eisini brot á grundleggjandi mannarættindi.

Fútarætturin hevur sent mær eitt útlendskt skriv, ið er dagfest 7. januar 2009. So vítt sum eg dugi at skilja, heldur "Kringvarp Føroya" seg eiga pening til góðar hjá mær?

Eg havi fleiri ferðir biðið "Kringvarp Føroya" um at strika meg sum lurtara og hyggjara, so leingi sum hesin almenni stovnur ikki heldur §10, stk. 1 og 2 í løgtingslóg nr. 61 frá 16. mai 2006 um kringvarp, har stendur m.a. um public service-skyldur:

*»Kringvarp Føroya skal í programmvirkseminum leggja dent á upplýsingar- og talufrælsi, sakliga og óhefta upplýsing og eitt fjølháttað tilboð, sum varðveitir og fjálgar um mál, mentan, átrúnað og siðalæru føroyinga.*

*Stk.2 Kringvarp Føroya eigur at leggja dent á at hava gott føroyskt mál í sínum sendingum. Kringvarp Føroya hevur skyldu at tryggja starvsfólkunum holla málsliga ráðgeving.«*

Tá "Kringvarp Føroya" í sendingum sínum leggur dent á at varðveita og fjálga um mál, mentan og siðalæru dana, so heldur kringvarpið ikki sínar public service-skyldur. "Kringvarp Føroya" virkar sum danskt nærvarp í Føroyum, og tað er greitt brot á løgtingslóg um kringvarp!

Harafturat hevur "Kringvarp Føroya" sett ein tíðindaleiðara, og tað er brot á §6, stk. 2 í kringvarpslógini. Og nú fólk verða søgd úr starvi, verða tey, ið frægast royndu at virða føroyskt mál og føroyska mentan, send til hús.

»Kringvarp Føroya" heldur uppá, at húski, ið kunnu móttaka sendingar kringvarpsins, hava gjaldskyldu, men so má kringvarpið eisini halda kringvarpslógina. Tað kann ikki vera so spinnandi galið, at bara føroyskir borgarar skulu halda lógina, meðan almenna kringvarpið kann gera sum tað vil? Um so er, so liva vit ikki í einum demokratiskum samfelagi!

Høvdu almenn kringvørp í t.d. Íslandi, Noregi ella Danmørk farið so lætt um sínar public service-skyldur sum "Kringvarp Føroya", so hevði tað óivað fingið avleiðingar beinanvegin! Har verður eingin útlendsk sending ella samrøða send uttan týðing.

Er tað veruliga ætlanin, at "Kringvarp Føroya" skal virka sum danskt nærvarp í Føroyum, so má lógargrundarlagið broytast.

Eg fari tí at heita á fútarættin um at vísa aftur kravi kringvarpsins. Eg kann ikki gjalda fyri eina vøru ella tænastu, sum eg ikki fái!«

Neyvan fái eg nakað viðhald í fútarættinum; um eg ikki gjaldi, so verður úttøka lýst í ogn mínari.

Mentamálaráðið hevur higartil hildið hondina yvir lógarbrotum kringvarpsins, spurningurin er, hvør er politiski viljin við §10 í kringvarpslógini? Er hetta bara ein úrskrift úr danskari lóg, so tað skal síggja út, sum "Kringvarp Føroya" hevur ein tilverurætt, meðan ein duld dagsskrá loyvir stovninum at virka sum danskt nærvarp í Føroyum?

Eg skilji ikki, at nakar føroyingur rindar kringvarpsgjald við góðum, tá peningurin miðvíst verður nýttur til at fylla føroyingar við donskum møsni og bróta niður føroyskt mál og føroyska mentan. Hví er tað t.d. so umráðandi hjá kringvarpinum at týða íslendskt, norskt og svenskt men ikki danskt?

Tá tað bar til hjá íslendingum at noyða ríkisstjórn og tjóðbankaleiðslu frá, so kunnu vit føroyingar eisini gera okkurt, um myndugleikar, kringvarpsstýri og -leiðsla halda fram at vanvirða §10 í kringvarpslógini og harvið mál og mentan føroyinga, sum er grundarlagið undir samleika, tjóðskapi og tjóðarbygging okkara.

Stundin er komin at taka upp annan tátt!

### Innsent tilfar

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Harald í Kálvalíð harald@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.